# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Amerikanararnir hava ikki hildið lyftið um at lata trygdardeildum okkara neyðuga útgerð*

*(irakska stjórnin)*

# Tey eru á lívi enn

**Taleban hevur ikki avrættað teir 22 suðurkoreonsku gíslarnar, hóast freistin er farin**



*Freistin hjá Taleban rann út í morgun, men hildið verður, at gíslarnir eru á lívi enn*

- Eg havi sitið uppi alla nátt. Hevði Taleban havt skotið gíslarnar, hevði eg vitað tað, sigur afghanski generalurin Ali Shah Ahmadzai.

Generalurin er ovasti fyri løgregluni í Ghazari-landslutinum, har Taleban burturflutti 23 suðurkoreanar fyri átta døgum síðani. Síðani hevur løgreglan kringsett staðið, har burturflytararnir fjala teir 23 gíslarnar.

Gjáramorgunin skutu burturflytararnir ein av gíslunum, og seinni varð líkið av honum funnið. Sambært løgreglumonnunum, sum funnu líkið, var maðurin skotin fleiri ferðir. Samstundis kunngjørdi Taleban, at ein av gíslunum var avrættaður.

- Eftir sum umsitingin í Kabul ikki er gingin kravi okkara um at lata felagar okkara leysar á møti, hava vit avrættað ein av gíslunum, stóð í kunngerðini frá Taleban.

### Forsetin varin

Afghanski forsetin, Hamid Karzai, hevur sagt, at myndugleikarnir fara ikki at eftirlíka kravinum frá burturflytarunum. Tað gjørdi stjórnin fyri einum hálvum ári síðani, tá nakrir fangar vórðu latnir leysir í býti við ein italskan tíðindamann. Tá var Hamid Karzai fyri hvøssum atfinningum, og fleiri vildu vera við, at avgerð hansara at slaka fyri Taleban fór at elva til fleiri burturflytingar.

Tað, sum nú er hent teimum 23 suðurkoreanunum, bendir á, at tey atfinningarsomu fingu rætt.

Sambært afghonsku myndugleikunum hava leiðarar í lokalum ættarbólkum roynt at fáa Taleban at lata gíslarnar leysar, men til fánýtis.

Afghonsku myndugleikarnir halda, at umleið 70 Taleban-limir halda vakt uppi yvir gíslunum.

# Løgreglan drepur fangarnar

**Sambært Humas Rights Watch eru minst 20 fangar myrdir í fongslum í Rwanda tað seinasta hálvárið**

- Í fleiri førum er talan um beinleiðis avrættingar, sigur Human Rights Warch, sum krevur, at ein óheft kanning verður sett í verk alt fyri eitt.

Alison Des Forges, sum er ráðgevi á afrikonsku deildini hjá mannarættindafelagsskapinum, sigur, at myndugleikarnir í Rwanda siga seg arbeiða við at skipa landið sum eitt demokratiskt rættarsamfelag, men taqð skal ikki gerast við at beina fyri fangum, sigur hon.

Sambært tíðindastovuni NTB hevur løgreglan í Rwanda viðgingið drápini, men sigur, at fangarnir royndu at flýggja, og at løgreglumenninir skutu eftir teimum fyri at fáa teir at steðga. Hesari frágreiðingini hevur Human Rights Watch ikki álit á. Felagsskapurin sigur tvørturímóti, at hann hevur prógv fyri, at talan var um morð og beinleiðis avrættingar.

## STUTT SAGT

### Marknastríð

Teir seinastu dagarnar hava Norðurkorea og Suðurkorea fundast um sjómarkið millum londini bæði, men í gjár var orðadrátturin á fundinum so harðligur, at norðurkoreanski samráðingarleiðarin rúmdi úr gundarhølinum. Sambært tíðindastovunum var Kim Yong-Chol skortreyður av øði, tá hann fór á dyr. Suðurkorea vil varðveita tað sjómarkið, sum ST setti í fimmtiárunum, men Norðurkorea vil hava tað broytt. Í 2002 doyðu seks suðurkoreanar í einum samanbresti á markinum, og trý ár frammanundan doyðu fleiri norðurkoreanskir fiskimenn, tá suðurkoreonsk sjóverjuskip skutu eftir skipi teirra.

### Nýggj herskip

Bretska verjumálaráðið hevur gjørt av, at herflotin skal hava tveir nýggjar flogberar, sum ætlandi verða lidnir í 2014. Skipini verða 65.000 tons stór og næstan tríggjar ferðir størri enn teir tríggir flogberarnir, sum bretski herflotin hevur í dag, og sum vórðu bygdir seint í sjeytiárunum og fyrst í áttatiárunum. Men tey nýggju skipini eru dýr. Sambært verjumálaráðharranum, Des Browne, fara tey at kosta 44 mia. krónur.

### Gloyma vestin

Trygdarráðið hjá teimum donsku stuttleikasiglarunum ger nú vart við, at alt ov nógv fólk gloyma at lata seg í bjargingarvest, tá tey fara í bát. Tað er annars ikki lógarkrav at vera í bjargingarvesti. Fyri nøkrum døgum síðani kannaði løgreglan á Fyn 128 stuttleikabátar, og tað vísti seg, at 20 prosent av bátunum høvdu ikki ta kravdu trygdarútgerðina. Higartil í ár eru 22 fólk druknað í Danmark.